# Tryggvi Johansen 70 ár



Sunnudagin 16. desember fylti Tryggvi Johansen, fyrrverandi stjóri á Sendistovu Føroya í Keypmannahavn, 70 ár.

Tryggvi er klaksvíkingur. Eftir lokna skúlagongd fekk hann sær útbúgving sum bankamaður og tók HH prógv á Niels Brocks Handelsskole í 1959 og HD prógv á Handelshøjskolen í Keypmannahavn í 1962. Tíðarskeiðið frá 1963-69 arbeiddi hann í ymiskum fyritøkum í Føroyum og undirvísti á Føroya Handilsskúla.

Hann var føroyskur umboðsmaður á donsku ambassaduni í Róm frá 1969-73. 1.august 1973 bleiv hann settur av Føroya Landsstýri sum føroyskur ráðgevi í marknaðar- og vinnuspurningum í Keypmannahavn. Hann arbeiddi í Føroyum ymisk styttri tíðarskeið, eitt nú var hann stjóri í Norðoya Sparikassa í 1977.

1. august 1979 varð hann settur sum stjóri á Føroysku Viðskiftastovuni í Keypmannahavn, sum nú eitur Sendistova Føroya. Hann var formaður fyri Færøsk Kvindeforenings Fond frá 1978-94 og limur í stýrinum fyri Dansk Turistråd frá 1981-94.

Føroyar hava fjøltáttaða samvinnu við Danmark, bæði politiskt, vinnuliga og mentanarliga. Somuleiðis búleikast nógvir føroyingar í Danmark. Summi festa búgv, meðan onnur arbeiða ella lesa styttri og longri tíðarskeið. Fyri sítt arbeiði sum millumlið millum føroysk og donsk áhugamál varð Tryggvi útnevndur til at fáa „Ridderkorset af Dannebrogsordenen" í 2003.

Tryggvi var stjóri á Sendistovu Føroya til 2005, tá hann fór frá fyri aldur, og í mars 2006 tók Herálvur Joensen við stjórastarvinum. Sendistova Føroya í Keypmannahavn húsast á Norðurbryggjuni, har eisini Sendiráð Íslands og Sendistova Grønlands halda til.

Tryggvi er sonur Louisu, f. Joensen, og Meinhard Johansen í Klaksvík. Hann er giftur Margit, dóttir Ebbu, f. Hansen, og Niels Mortensen, keypmann, í Havn, tey eiga fýra børn: Einar, Beinta, Elsuba og Heðin.

Tryggvi var burturstaddur føðingardagin.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum mintust meg á 85 ára føðingardegnum tann 25. juli veiti eg mína hjartans tøkk og við ynskjum um eini góð og gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

**Vinarligar heilsanir**
**Kristina Joensen, Oyndarfjørður**

## Tøkk



Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum tann 13. okt. tá vit hildu 65 og 70 ára føðingardagar okkara takka vit hjartaliga.

Familju, vinum og kenningum ynskjast eisini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Ása og Richard Danielsen**

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá okkara elskaði sonur og bróðir

**Dánjal Jákup Arnason Nielsen**

so brádliga bleiv tikin frá okkum.
Takk til tykkum øll, ið vóru við í leitingini henda lagnudagin og tøkk til starvsfólkini á Suðuroyar sjúkrahúsi.
Takk til prestarnar Jónsvein Bech og Ólav Rasmussen, fyri tykkara stóru hjálp.
Hjartans tøkk øll tit mongu, ið góvu blómur, gávur og kransar og sum fylgdu Dánjal Jákupi
Tit mongu, ið hjálptu so væl til hesar dagarnar, bæði í heimi okkara, til jarðarferðina og í ervinum, tykkum øllum takka vit hjartaliga.
Hjartaliga takka vit øllum, sum ringdu ella skrivaðu til okkum, og sum vitjaðu okkum hesar dagar og í tíðini aftaná, heilt fram til dagin í dag.
Hjartaliga takka vit teimum, sum umvegis SMS-boð skipaðu fyri, og luttóku í at seta ljós í vindeyguni fyri at minnast Dánjal Jákup og Bárðu, tað var fløvandi at uppliva slíka samkenslu.

Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt vælsignað nýggjár.

**Arni, Evona, Margit og Petra**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá elskaði maður, pápi, verfaðir, abbi og beiggi okkara

**Pauli Reinert Petersen**
Saltnes

so brádliga andaðist og varð jarðaður.
Takk til starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum - bæði tey, sum vóru um Paula ímeðan hann var har og tey, sum hjálptu og ráðgóvu okkum avvarðandi, tá Pauli kom heim úr Danmark.
Takk til starvsfólkið á Hotel Tórshavn, sum vóru um tey avvarðandi, sum fóru til Danmarkar eftir Paula og takk til Øssur Berghamar fyri troystarrík orð í kapellinum á Ríkissjúkrahúsinum.
Takk til tykkum øll, ið vóru við til andaktina har.
Takk til tykkum, ið hjálptu til í kapellinum á Landssjúkrahúsinum.
Takk til Hanus Simonsen og Alfred Olsen fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Takk til Martin Restorff Jacobsen, fyri hjálpsemi í sambandi við jarðarferðina og fyri troystarrík orð í kirkjuni.
Takk til Njal fyri sangin í kirkjuni.
Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og til øll tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Takk til tykkum øll, ið lótu blómur, kransar og peningagávur.
Takk til tykkum mongu, ið fylgdu Paula, á hansara seinastu ferð her á fold:
Tit, sum tóku ímóti á flogvøllinum, tit sum vóru í kapellinum á Landssjúkrahúsinum og í Fríðrikskirkjuni, tá hann kom heim har, og tit sum fylgdu Paula við jarðarferðina.
Ein takk skal til seinast ljóða til familju, vinir og kenningar fyri ta stóru hjálp og umsorgan vit hava fingið í hesi sváru og tungu tíð. Takk fyri vitjan, uppringingar, heilsanir og fyri gávur av ymiskum slag.
Vit ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

*Fyri tey, ið varða av*
**Judy, Sonja, Hans Jacob, Poula og Dávid**